# dreymur um føroyskt mál

> *Sjálvandi vil eg sleppa at arbeiða. Allar kvinnur ynskja at arbeiða, bæði fyri at hava sínar egnu pengar og fyri at vera saman við øðrum fólki.*

og mamman á almennum arbeiðsplássi.

Dasha hevði ein níggju ár eldri beiggja, og barnaár hennara líktiskt tí hjá øðrum børnum í Russlandi. Sum lógin kravdi var hon limur í ungdómsfelagskapinum hjá kommunistiska flokkinum. Tað vóru øll børn, sigur hon.

**Føroyska paradísið**

Fyri umleið trimum árum síðani møtti Dasha einum føroyingi á einari veitslu fyri støk í St. Petersburg. Hon sigur, at hon visti beinanvegin at hesin róligi persónurin var ein góður maður. Tey skrivaðu saman og vitjaðu hvønn annan, og fyri hálvun øðrum ári síðani flutti Dasha til Føroyar.

Og sjálvt um hon onkuntíð longist aftur til vinirnar í St. Petersburg, og hóast veðrið onkuntíð kann vera eitt sindur tungt, so er hon glað fyri sítt nýggja land. Hetta er eitt paradís fyri børn, sigur hon. - Fólk eru blíð og vinarlig, nábúgvarnir hava verið gestablíðir, og hóast eg eri smæðin, virðismeti eg hetta høgt.

**Stórbýarlív**

Dasha tók eina trý ára langa pædagogútbúgving í Russlandi, og arbeiddi so nøkur ár á barnagarði. Síðani valdi hon at útbúgva seg víðari til ítróttarlærara. Hetta tók fýra ár.

Um somu tíð fekk hon



elsta sonin. Lívið sum einlig mamma í St. Petersburg var ikki altíð so lætt. Hon arbeiddi sum lærari, og sjálvt um prísirnir á matvørum vóru nógv lægri, enn teir eru í Føroyum, so var lønin eisini so lág, at ikki nógv var eftir.

Stórbýarlívið kann vera stuttligt, tá ein er ungur, men tað er ikki tað besta fyri børn. St. Petersburg er merktur av nógvum kriminalitetið, og Dasha mátti hvønn dag leiða son sín í skúla og vera aftur eftir honum, tá skúlin var liðugur. Hon tordi ikki annað, tí gøturnar vóru ov vandamiklar fyri børn. Dasha longist heldur ikki aftur til altíð at skula skunda sær og altíð at vera bangin fyri at koma ov seint.

**Málið er lykilin**

Dasha er í løtuni í barnsburðafarloyvi. Annars arbeiðir hon á Høvdavirkinum í Lorvík, har eisini fleiri onnur starvsfólk eru úr Russlandi. Hon er glað fyri at hava eitt arbeiði.

– Sjálvandi vil eg sleppa at arbeiða. Allar kvinnur ynskja at arbeiða, bæði fyri at hava sínar egnu pengar og fyri at vera saman við øðrum fólki.

Men um hon skal hava nakran møguleika at fáa arbeiði uttanfyri fiskiídnaðin, má hon fyrst læra føroyska málið. Málið er lykilin til alt, heldur hon. Sum er, verður føroyskt undirvíst eitt kvøld um vikuna, og tað er ikki nokk. Dasha hevði ynskt, at hon kundi farið á eitt intensivt skeið í føroyskum á sama hátt sum innflytarar í Danmark gera. Hon vil gjarna læra føroyskt, tí tað er her hon vil liva - saman við góða manninum og føroysku børnunum.

---

# Ungir danskir menn eru søguliga góðir pápar

**At skifta blæu, røra greyt, fara túr við børnunum og at halda barsilsfarloyvi. Ungir danskir menn taka sær nógv meira av sínum børnum, enn pápar og abbar teirra nakrantíð hava gjørt**

JAVNSTØÐA
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*



Fyri 20 árum síðan hildu uml. 15.000 danskir menn barsilsfarloyvi. Í dag er talið hækkað til tað dupulta. Longdin á farloyvinum er eisini økt til 3½ viku í miðal, sigur Javnstøðunevndin á heimasíðuni.

– Teir hepnast ótrúliga væl við faðirskapinum, tí teir prioritera tað høgt. Teir hava viljan at gjalda prísin, tað kostar, eitt nú at steðga upp á arbeiðsmarknaðinum eina tíð. Og teir skulka sær ikki undan at vera heima hjá børnunum, tá tey eru sjúk. Faðirskapið er tað økið, har størstu broytingarnar eru hendar í mannfólkalívinum«, sigur mannfólkagranskari við Roskilde Universitetscenter, Kenneth Reinicke.

Hann heldur, at ungu páparnir hava skilt, at teir lumpa seg sjálvar, um teir bara leypa inn í traditionellu kynsleiklutirnar, har arbeiði og fótbóltur hava størsta týdningin.

»Teir hava funnið útav, hvat tað merkir at hava eitt lív umframt arbeiðslívið, og hvussu nógv andliga ríkari teir vera, av at vera til staðar hjá børnunum og familjuni«, sigur Kenneth Reinecke. Hann leggur dent á, at sjálvt um nógvir pápar framvegis raðfesta arbeiðið høgt, so eru teir bæði nærverandi, ídnir og ábyrgdarfullir, tá teir koma heim til børnini, sigur Javnstøðunevndin frá Jyllands-postinum á www.javnratt.fo



# Bomm og køkur úr dagstovnum

Danski ráðharrin í familju og -brúkaramálum, Carina Christensen, mælir nú til, at alt góðgæti skal burtur úr dagstovnum.

Ráðharrin heitir á allar kommunur og dagstovnar um at orða ein greiðan kostpolitikk alt fyri eitt. Ongar ætlanir eru tó um at løggeva móti góðgæti og køkum, og ráðharrin heldur fast við, at tað eru foreldrini sum hava evstu ábyrgdina av kostinum hjá børnunum.

Danskar kanningar vísa, at børn eta eins nógva køku sum rugbreyð, og at nýtslan av góðgæti hækkaði við einum triðingi í árunum 1995 til 2002.

# Danir skulu hava fleiri børn

Í miðal skulu familjurnar hava trý børn. Soleiðis ljóðar nýggja málið hjá familjuráðharra, Carinu Christensen.

– Vit skulu fara úr tveimum upp í trý børn. Eg haldi tað er løgið, at fólk ikki fáa fleiri børn, tí fari eg at seta eina kanning í verk, sum skal avdúka, hvat forðar fólki í at fáa fleiri børn, sigur Carina Christensen við Berlingske Tidende.

Sambært ritzau, siga S og R, at barnleysi familjuráðharrin ikki skal blanda seg uppí, hvussu nógv børn fólk fáa.